Vegleiðing 15/2014

# Vegleiðing til virki, sum framleiða ella umvæla pakning, plattar o.a. úr innfluttum, viðgjørdum viði.

**Henda vegleiðing er ætla virkjum, sum ætla at framleiða einnýtis plattar o.a. pakkitilfar úr viði.**

## Lógargrundarlag

Landsstýri lýsti í juni 2013 nýggja kunngerð um framleiðslu av plattum o.ø. pakkitilfari úr viði - *Kunngerð nr. 72 í 2013.*

Umframt at góðkenningar- og eftirlitsmyndugleikin nú er Umhvørvisstovan, er størsta broytingin við nýggju kunngerðini tann, at í gomlu kunngerðini stóðu krøvini til framleiðsluna útgreinað í fylgiskjølum til kunngerðina, meðan tað í nýggju kunngerðini er ásett, at krøvini verða ásett í sjálvari góðkenningini. Annars víst til millumtjóða reglur sum International Plant Protection Convention (IPPC) og ISPM No. 15 (International Standards for Phytisanitary Measures No. 15): Regulation of Wood Packaging Material in International Trade.

Sambært nýggju kunngerðini skal umsókn um góðkenning ella endurnýgging av góðkenning latast Umhvørvisstovuni á umsóknarblaði, sum Umhvørvisstovan evnar til.

Umhvørvisstovan ásetur síðani í góðkenning treytir um, hvussu virkini skulu hitaviðgera, framleiða, umvæla, endurnýggja og merkja pakkitilfar, plattar, við o.a. Umhvørvisstovan ásetur eisini treytir um góðskustýring, innaneftirlit, skjalprógv o.a. sambært IPPC og ISPM No.15

Harafturat hevur Umhvørvisstovan eftirlit við, at ásetingarnar í kunngerðini og góðkenningar-treytirnar verða hildnar.

## Viður og viðgerð

Børkur skal ikki vera á viði, sum verður brúktur til framleiðslu av pakkitilfari, plattum o.ø. til millumlanda flutning.

**Umhvørvisstovan**· Traðagøta 38 · Postboks 2048 · FO-165 Argir · Tlf: +298 34 24 00 · Fax: +298 34 24 01· us@us.fo · www.us.fo

Loyvt er, at avmarkaðar leivdir av børki eru á tilfarinum:

- álir,  sum hvør er smalri enn 3 cm uttan mun til longd, ella
- álir, sum samanlagt eru smærri enn 50 $cm^2$

Viðurin skal vera hitaviðgjørdur við í minsta lagi 56 stigum celsius í øllum tvørskurðinum, mált í kjarnini í viðinum í minsta lagi 30 minuttir.

Um viðurin er hitaviðgjørdur, kann børkurin verða tikin av viðinum, eftir at viðgerðin er gjørd.

Um viðurin er viðgjørdur við Methyl Bromide (MB), skal børkurin vera tikin av viðinum, áðrenn viðgerðin byrjar.

Undantikið er tó tilfar úr træfiburplátum, krydsfinér, finér, saguspønum, træull ella ráum viði, sum er skorin í tjúktir, ið eru klænri enn 6 mm.

Viðgerð av tilfari til framleiðslu av pakkitilfari er nærri lýst í ISPM No 15, Annex 1.

## Góðskustýring

Virkið skal vísa á eina mannagongd í sambandi við hvørt av niðanfyri nevndu punktunum:

1) Hvussu tryggjað verður, at allur viður, sum virkið tekur ímóti í sambandi við framleiðslu ella umvæling av pakningi o.ø hevur neyðug skjalprógv.

2) Hvussu viðgjørdur viður trygt verður hildin burtur frá óviðgjørdum viði, tá hann verður fluttur, allastaðni á virkinum og á goymslu.

3) Hvussu tryggjað verður, at pakningur úr viði bert verður framleiddur úr viði, sum er viðgjørdur eftir galdandi reglum.

4) Hvussu tryggjað verður, at pakningur úr viði verður merktur eftir ásetingunum í ISPM-15, Annex 2.

5) Hvussu møguligir feilir í framleiðsluni vera staðfestir og rættaðir.

6)Hvussu møgulig staðfesting av skordýrum o. ø. verður skrásett, fráboðað og kannað.

7) Hvussu virkið tryggjar, at ásettar mannagongdir verða hildnar og kannaðar regluliga.

8) Hvussu starvsfólk, sum røkja uppgávur í sambandi við framleiðslu av góðkendum viði, verða upplærd.

Kapiltul 4.3 í ISPM No. 15 ásetur, at mynduleikarnir í framleiðaralandinum hava ábyrgdina av at tryggja og prógva, at framleiðsla av pakkitilfari fer fram sambært treytunum í standardinum.

## Merking av pakningi

Merkið er ein rætthyrntur ella ferhyrntur rammi. Ein loddrætt linja býtir merkir sundur í tveir partar.




Vinstrumegin linjuna skal tað varda eyðkennismerkið (logo/IPPC-merki) standa. Høgrumegin skulu landakota, góðkenningarnummar og viðgerðarkota standa.

Upplýsingarnar skulu gevast soleiðis:
a) Í fyrstu reglu vísir "**FO-000**" til ávikavist Føroyar og góðkenningarnummarið á virkinum.
b) Í aðru reglu vísir **YY** til viðgerðina, sum viðurin hevur fingið:

- **HT** verður skrivað fyri "Heat Treatment", um viðurin er hitaviðgjørdur og
- **MB** verður skrivað fyri "Methyl Bromide", um viðurin er Methyl Bromide viðgjørdur

Einki annað tekin, súmbol ella tilíkt má standa á merkinum. Uttan fyri merkið kann standa ein talkota e. t., sum kann setast á fyri at eyðmerkja framleiðslueindina

Merkingin skal verða sett á í minsta lagi tvær sjónligar flatur á hvørjum pakningi. Á pakningseindum av viði, sum skulu framleiðast til pakning, skal merki setast á í minsta lagi eina síðu á hvørjari pakningseind.

Merkingin, ið skal vera týðilig, skal vera brend, málað ella stemplað á. Reyður ella appilsingulur litur skal ikki nýtast.

Samlaða støddin á merkinum skal í minsta lagi vera 60 mm x 60 mm. Bókstavir og tøl skulu í minsta lagi vera 12 mm høg, tó bert 6 mm høg, um talan er um pakning til minni enn 30 litrar ella 30 kilo. Logo skal í minsta lagi vera 60 mm x 18 mm (HxB).

Merkingin er nærri lýst í ISPM No 15, Annex 2.

## Umvæling av pakningi

Umvæling merkir, at minni enn triðingurin av upprunaliga tilfarinum er skiftur út.

Til umvæling av pakningi, sum er merktur í samsvari við ISPM-15, Annex 2, má bert nýtast viður, sum er viðgjørdur í samsvari við ISPM-15,  Annex 1.

Allur viður, sum verður nýttur til umvæling, skal merkjast í samsvari við ISPM-15, Annex 2.

## Endurnýgging av pakningi

Endurnýggjan merkir, at meira enn triðingurin av upprunaliga tilfarinum er skiftur út.
Øll merkir við einum logo, sum samsvarar við ISPM-15 Annex2, skulu burturbeinast varandi.

Allur tann endurnýggjaði pakningurin skal viðgerast samsvarandi við ISPM-15 Annex 1.

Síðani kann pakningurin merkjast sum ISPM-15, Annex 2.

## Minstu krøv til skjalprógv

Vørusendingin skal hava eina av tveimum møguligum skjalprógvum:

**Antin:**
Í minst einum handilsskjali, sum fylgir við vøruni, skal standa, at útflýggjaða vøran er viðgjørt við einari av teimum viðgerðunum, sum eru nevndar í ISPM-15, Annex 1.

Hvør eind av pakningi skal vera merkt við:

- eini lesiligari merking, ið ikki kann skavast burtur, sum vísir landakotu, góðkenningarnummar og viðgerðarkotu (HT ella MB), ella
- einum lesiligum og eintýddum nummari, ið ikki kann skavast burtur, sum vísir til sama nummar í handilsskjalprógvunum.

**Ella:**
Saman við viðinum skal vera eitt plantuheilsuprógv, sum tilskilar teir partar av vørusendingini, sum eru viðgjørdir sambært ISPM-15, Annex 1.

Fyrstuferð útgivin: 08.05.2014
Útgáva nr. 1
.